# POLITISKT KJAFTASLIT UPP UNDIR EVSTAMARK

**SAMGONGUPOLITIKARAR** HAVA FARNU VIKUNA DANSAÐ EIN **SJÁLDSAMAN** DANS, NÚ **LØGTINGIÐ** SKAL VIÐGERA **FÍGGJARLÓGINA**. **BJARNI DJURHOLM** HELDUR **KAJ LEO JOHANNESEN** VERA SUM FLUGU Í FLØSKU, **LØGMAÐUR** SIGUR SEG IKKI MALA Í RING, **JÓANNES EIDESGAARD** BIÐUR ALLAR **SAMGONGULIMIR** HALDA KJAFT, OG **EDMUND JOENSEN** ÆTLAR SÆR **IKKI** AT TIGA OG VIL HAVA **ÁVIRKAN**. **ANNITA Á FRÍÐRIKSMØRK** HEVUR SO BIÐIÐ TEIR **ALLAR** FARIÐ TIL ARBEIÐIS



**POLITIKKUR**

Uni Arge
ua@sosialurin.fo

Politiskir eygleiðarar hava leingi verið samdir um, at ilt er at fáa eyga á nakra kós tiansheldur nakra semju millum flokkarnar í samgongu. Gamaní eru flokkarnir samdir um at sita, har teir sita, men hvat felags málið hjá teimum er, er trupult at síggja. Ósemjurnar goysa hinvegin upp úr ymsum opum við jøvnum millumbilum, serliga tá einstaklingar fáa markeringshungur og kunngera sínar hugsanir um allar geilar.

Soleiðis var eisini hesa vikuna, men hendan vikan var øðrvísi á tann hátt, at hon var ikki sørt undirhaldandi. Tað byrjaði við, at Bjarni Djurholm, tingmaður hjá Fólkaflokkinum, skrivaði í kronikk, at partar av samgonguni longu tykjast at hava slept endanum og við markeringum fyrireika seg til samgonguslit heldur enn at taka avgerðir, ið eru neyðugar, nú stór tøk skulu takast. Bjarni Djurholm skrivaði:

»Løgmaður, sum skuldi verið oddvitin, minnir mest um flugu í fløsku, ið stjórnar flokki, sum er farin av um tvøran, har loyaliteturin hjá partamonnum móti formanni og samgonguleiðara er syndarligur. Harumframt lefrar minsti samgongufIokkurin púra opinskárað og illoyalt til andstøðuna. Tað var væntandi, at við áhaldandi vánaligum veljarakanningum fór Javnaðarflokkurin at skinkla í límingini og heldur ynskja sær eina tilveru í andstøðu.«

> ***»Løgmaður, sum skuldi verið oddvitin, minnir mest um flugu í fløsku, ið stjórnar flokki, sum er farin av um tvøran***
>
> *Bjarni Djurholm*

Eftir hesa breiðsíðuna og uppáhald frá Bjarna Durholm um, at samfelagið er á veg ímóti stagnatión heldur enn einum sjálvberandi búskapi, tók Kaj Leo Johannesen, løgmaður, orðið í almennum lesarabrævi. Fiskivinnan og alivinnan hava ongantíð vunnið so nógvan pening sum nú, segði hann, men útgreinaði ikki, um fiskivinna merkti botnfiskaveiða, flakavinna og ella kanska uppsjóarfiskiskapur. Hann skrivaði:

»Góði Bjarni, landið er ikki á egg-ini til hóttafall. Men vit hava brúk fyri øllum góðum samstarvskreftum í samgonguni, um vit skulu náa okkara málum. Í tí høpinum vænti eg ikki, at tín lutur fer at liggja eftir. Tí eitt skalt tú eiga, Bjarni, tú ert av teimum mest loyalu mótvegis samgonguni í tinginum, og tað er tað, vit hava brúk fyri í komandi tíðum. Við vón um framhaldandi gott samstarv.«

### Sjáldsamt hjartasuff

Hesi orð løgmans til samstarvsfelagan, ið segði, at løgmaður mól sum fluga í fløsku, vóru nærum rørandi, men leingi var ikki friður millum manna, tí úr Fíggjarmálaráðnum hoyrdist nú eitt suff av teimum ikki sørt sjáldsomu. Jóannes Eidesgaard, ið skal hava lagt fíggjarlógina fyri tingið áðrenn 30. september, segði orðið, sum nærum ongantíð verður brúkt í politikki. Hann bað hinar báðar halda kjaft. M.a. skrivaði hann:

»Fíggjarlógartilgongdin er trupul og altíð sera viðbrekin. Nógvir kamelar skulu svølgjast serliga í tíðum, har útgjaringar eru avloystar av sparingum og tiltøkum, sum tey flestu hava til endamáls at tálma einum alt ov stórum halli. Tí er als ongin orsøk til, at vit í samgonguni nú fara út í fjølmiðlarnar at skjóta hvønn annan niður um tiltøk í einum ikki lidnum uppskoti.«

Jóannes Eidesgaard vildi altso ikki hoyra meira alment kegl frá sínum samgongufeløgum, og júst sum á einum innanhýsis fundi, tá bylgjurnar ganga hægst, vísti hann bersøgið á víðagitnu orðini hjá Statsråd Michelsen í telegrammi til Bjørnstjerne Bjørnson, tá Noreg í 1905 var um at tryggja sær fullveldi, at nú galt ikki um at blanda seg, men um at halda kjaft.

Hetta er helst fyrstu ferð, at ein løgmaður so opinlýst hevur fingið boð um at halda gák, men skuldi nakar siga sovorðið, skuldi tað ivaleyst vera ein fyrrverandi løgmaður. Og skuldi so nakar leggja upp í orrustuna aftrat, ja, so mátti tann leikarin á pallinum ikki vera minni enn ein annar fyrrverandi løgmaður, og tað var hann eisini. Edmund Joensen setti seg við tangentarnar og sang hesa vísuna:

»Jóannes Eidesgaard eigur at skriva